inni - trygt og ómaksleyst til hús



**Tvíhús Skørugøta 3, Tórshavn**
Tvíhús við íbúð í kjallarinum og stórari garasju. Húsini eru í tveimum hæddum, hvør á 67 fermetrar - í alt 134 fermetrar, harafturat garasjan sum er 40 fermetrar. Húsini eru dagførd í 2007 og eru í góðum standi. Í erva er durur , gongd, stova / køkur í einum, hjúnarúm, kamar og baðirúm við brúsu. Frá stovuni er hurð út á stóra altan. Í neðra er durur, gong, køkur, fýrrúm/vaskirúm, hjúnarrúm, kamar og baðirúm við brúsu. Húsini standa í friðarligum umhvørvi nær fríøki , tætt við bakara/handli og stutt oman í Gundadal. Sera gott útsýni oman yvir býin og Nólsoyar fjørð
Prísuppskot : 2.000.000,00



**Summarhús/Sethús Brekkuvegur 4, Eiði**
Húsini íð eru fyrrverðandi deildin hjá Eik banka á Eiði. Húsini eru í 3 hæddum, sum hvør er umleið 40 fermetrar. Grundøkið er 117 fermetrar. Í miðhæddini er eitt rúm, sum er sundurskilt við veggjum, og har er trappa upp á ovastu hædd. Í ovastu hædd er køkur, kamar, wc og opið rúm úti á loftinum. Í niðastu hædd er lágur kjallari/fýrrúm. Húsini standa mitt í bygdini, og eru væl egnaði sum summarhús.
**Prísuppskot : 400.000,00**



**Sethús Geilin 1, Fuglafjørður**
Hugnaligu húsini eru í 3 hæddum, sum hvør er 90 fermetrar - íalt 270 fermetrar. Grundøkið er 605 fermetrar. Byggiár : 1952. Í miðhæddini er durur, gongd við trappu upp á ovastu hædd og niður til niðastu hædd, køkur og stova .Í ovastu hædd er wc, baðirúm, hjúnarúm og 3 kømur. Í niðastu hædd er kjallararúm, wc, kovi, grovkøkur, skrivstova og durur. Urtagarður er rundan um húsini, sum standa í friðaligum og veðurgóðum umhvørvi, og har er sera gott útsýni.



**Sethús á Gørðum, Kalbak**
Sethúsini / summarhúsini eru í 3 hæddum á 42 m2 og uppíbygdur hjallur á 10 m2 - í alt 136 m2. Grundøkið er heilar 1458 m2. Byggiár: 1938, men tað mesta er gjørt av nýggjum innan í miðhædd og í ovastu hædd í 1996, og alt er væl hildið. Í miðhæddini er hjallur, inngongd, gongd, baðirúm, køkur / alrúm / borðsstova / stova. Í ovastu hædd er trappupallur við skápum og 2 kømur. Í niðastu hædd er fýrrým / kjallararúm. Húsini standa í firðarligum og barnavinaligum umhvørvi við frálíkum panoramaútsýni yvir allan fjørðin. Stutt er til barnagarð og skúla, og busssambandi er frálíkt og kostar einki.
**Prísuppskot :1.000.000,00**



**Jørð – Argjabogagøta 38, Argir**
Ognin er eitt stórt jarðarstykki uml. 3.460 fermetrar í C 3, miðstaðarøki. Loyvt er at byggja randarhús / tvíhús / blokkar og til tænastuvinnu / handil. Ognin, ið liggur úti á Argjaboða, liggur væl fyri við sera góðum útsýni út á fjørðin.
**Prísuppskot: kr. 5.000.000,00.**



**Sethús : Glyvravegur 46, 625 Glyvrar**
Snotulig húsini eru í 3 hæddum. Ovasta hæddin er umleið 40 m2 - Miðhæddin umleið 60 m2 - Niðasta hæddin umleið 60 m2. - íalt umleið 160 m2. Grundøkið er 822 m2. Byggiár 1935. Til húsini hoyrur eisini ein hjallur, ið er 10 m2. Í ovastu hæddini er , 2 kømur, hjúnarúm og baðirúm. Í miðhæddini er durur, gongd, køkur stova og kamar. Í niðastu hæddini er, vaskirúm/fýrrúm, wc, 3 kømur og útgongd til terassu. Parkeringspláss er við húsini. Húsini standa við høvuðsvegin, har er veðurgott og sera gott útsýni. Stutt er til handlar og gott bussamband er
**Prísuppskot : 1.000.000**



**Sethús Toftanes 38, Leirvík**
Hugnaligu husini eru í 2 hæddum. Miðhæddin er uml 70 $m^2$ - Ovara hæddin er uml. 50 $m^2$ - Íalt umleið 120 $m^2$. Grundøkið er 210 $m^2$. Byggiár í 1950 inum. Til húsini er eisini ein hjallur og ein arbeiðsskúrur. Í miðhæddini er durur, fýrrum, gongd, vaskirúm, stova/køkur í einum og trappa upp á loftið. Í ovaru hæddini er hjúnarúm, kamar og stova. Húsini er sera orkusparandi Parkeringspláss er við húsini, sum standa við blindveg. Har er veðurgott, friðaligt, barnavinarligt og sera gott útsýni. Stutt er til allar hentleikar.
**Prísuppskot : 850.000,00**



**Sethús : Undir Klakki 47, 700 Klaksvík**
Húsini eru í 2 hæddum - Ovasta hæddin er127 m2 - Niðasta hæddin er 65 m2, íalt 192 m2. Grundøkið er 507 m2. Byggiár 1986. Eisini er ein garasja, ið er 35 m2.. Í ovastu hæddini er, durur, køkur, stova, millumgongd, 3 kømur, hjúnarrúm, baðirúm, turkirú/fýrrúm, hjallur og niðurgongd til niðastu hædd Í niðastu hæddini er, kjallararúm/vaskirúm, gongd, 2 kømur og baðirúm. Fleiri parkeringspláss eru til húsini. Húsini standa ovaliga í býnum, har er veðurgott, barnavinarligt og sera gott útsýni.
**Prísuppskot 1.500.000**



**Grundøki – Hvarvið 7B, Tórshavn**
Grundstykkið, sum liggur heilt einastandi væl fyri í gangiavstandi frá býnum, er 558 m2 til víddar og er væl egnað til at byggja sethús á. Vegur er til stykkið, og tað er lætt at gera byggiklárt. Grundstykkið liggur nýggjari útstykking í vøkrum, friðarligum og barnavinaligum umhvørvi við blindan veg. Stutt er til skúlar, stovnar og handlar. Útsýnið er einastandandi gott yvir alla Havnina og út á fjørðin, og einki kemur upp fyri.
**Prísuppskot: kr. 1.300.000,00.**



**Sethús : Myruvegur 19, 460 Norðskáli**
Húsini eru í 3 hæddum - samlað búvídd umleið 179 m2, eisini er ein hjallur, íð er umleið 10 m2. Grundøkið er 752 m2. Byggiár : 1983. Húsini eru úr betong og endavegginir eru klæddir við timbri, hava trævindeygu og alumantak. Í miðhæddini er inngongd, wc, kamar og trappuuppgongd. Í ovastu hæddini er gongd, stova, køkur. Í niðastu hæddini er gongd, 2 kømur, hjúnarúm, baðirúm, kjallararúm/fýrrúm og krúpikjallari.
**Prísuppskot : 1.300,000**



**Sethús – Dalatún 8, Tórshavn**
Húsini eru í 2 hæddum á 122 $m^2$ - í alt 244 $m^2$. Grundøkið er 345 $m^2$. Byggiár: 1952, men nógvar umvælingar og dagføringar eru gjørdar. Nevnast kann m.a. nýtt ak, tætt tróður, nýggjan klædning, úthurðar, garaguhurð, stovan, 2 kømur, baðirún í erva, ketil, oljufýr, pumpa, oljutangi, rútar, garður, stakitt, altan, tak á garagu, nýggj el-innføring, vatninnføring og rør, telefoninnføring, internet. Í ovaru hædd er inngongd, durur, vaskirúm, hjallur, gongd, matarkøkur, kovi, borðsstova, stova, millumgongd, hjúnarrúm, baðirúm, kamar við útgongd til altan og kamar. Í neðra er sjálvstøðug íbúð. Har er inngongd, durur, stova, køkur, baðirúm, fýrrúm, 2 kømur. Hartil er goymslurúm, garaga og verkstaður. Uttanum húsini er garður / urtagarður. Húsini standa í friðarligum, veðurgóðum og barnavinaligum umhvørvi við blindan veg. Útsýni er frálíkt og grannalagið er gott. Húsini standa nær við dagstovnar, skúlar, lærustovnar og handlar – alt er beint við hondina.



**Sethús. Oysvíksvegur 12, 750 Viðareiði**
Húsini eru í 2 hæddum - samlað búvídd uml. 270 fermetrar íroknað garasju í niðara hæddini. Grundøkið er uml: 610 fermetrar. Byggiár: 1972. Húsini hava hava stoypta grund, eru kløðd við plastikk plátum, hava trævindeygu og jarntak. Í ovaru hædd er gong, køkur, stór stova, baðirúm, hjúnarrúm og 2 kømur. Í niðaru hædd er gong, 2 kømur, goymslurúm, arbeiðsrúm, fýrrúm, hjallur og garaga. Giring við grasplenu er kring húsini. Húsini standa í friðarligum og natúrvøkrum umhvørvi. Húsini verða seld um hóskandi boð fæst.



**Grundøki – Hvarvið 7C, Tórshavn**
Grundstykkið, sum liggur heilt einastandi væl fyri í gangiavstandi frá býnum, er 610 m2 til víddar og er væl egnað til at byggja sethús á. Vegur er til stykkið, og tað er lætt at gera byggiklárt. Grundstykkið liggur í nýggjari útstykking í vøkrum, friðarligum og barnavinaligum umhvørvi við blindan veg út til friðað øki. Stutt er til skúlar, stovnar og handlar. Útsýnið er einastandandi gott yvir alla Havnina og út á fjørðin, og einki kemur upp fyri.
**Prísuppskot: kr. 1.300.000,00.**



**Íbúð – undir Kongavarða, Tórshavn**
Nú eru bert 1 eind eftir av frálíku íbúðunum undir Kongavarða, sum eru 102 $m^2$ til støddar. Harafturat er felagsøki, trappugongd og lyfta. Íbúðin, sum er í gerð, er sera snøgg, væl gjørd og úr besta tilfari. Hon er væntandi liðug várið 2009. Har er trappurúm / lyfta, inngongd, gongd / forstova / garderoba, baðirúm / vaskirúm, køkur, borðstova / stova við útgongd til svala, hjúnarrúm við útgongd til svala og kamar. Íbúðin liggur í friðarligum, náttúruvøkrum og barnavinaligum umhvørvi við góðum tilplantaðum felagsøki, spæliplássi, sparkivølli og góðum parkeringsøki. Íbúðirnar eru á 4. hædd og hevur panoramaútsýni yvir alla Havnina, Nólsoynna og fjørðin. Afturat keypskostnaðinum skal leggjast út kr. 150.000,00 fyri mvg, ið keyparin kann søkja um at fáa endurgoldið.
**Prísuppskot: kr. 1.913.010,00**



**Grundstykki – Brattalíð 19, Tórshavn**
Grundstykki, sum liggur einastandi væl fyri, er 607 m2 til víddar og er væl egna til at byggja m.a. tvíhús á. Vegur er til ognina, og tað er lætt at gera byggiklárt. Grundstykki liggur í friðarligum og barnavinaligum umhvørvi við blindan veg. Stutt er til skúlar, stovnar og handlar. Stórt parkeringsøki er frammanfyri, og einki kemur upp fyri útsýnið, sum er avbera gott yvir alla Havnina og út á fjørðin.
**Prísuppskot : 2.000.000,00**



**Tvíhús : Gerðisgøta 9, 627 Lamba**
Á sumri 2008 verður farið undir at byggja eini tvíhús á Gerðisvegi í Lamba sum eftir ætlan skulu standa liðug heysti 2008. Húsini verða í 2 hæddum - samlað búvídd 172,5 fermtrar. Húsini koma at hava føroyaprofil klædning svart alminiumstak, tætt tróður við dúki, plastikk vindeygu og úthurðar. Innhurðarnar verða fyllingshurðar ( Finland), og gólvini á vesinum verða sveisivenyl. Í ovaru hæddini verður durur, gongd, baðirúm og 2 kømur, hjúnarrúm, goymslurúm, køkur / stova og svali. Møguleiki verður at velja gólv og køk eftir egnum ynski. Niðara hæddin verður óinrættað
**Prísur : 1.250.000**

P/F inni • Niels Finsens Gøta 37
P.O. Box 364 • FO-110 Tórshavn
inni@inni.fo • Tlf. 35 42 00 • Fax 35 42 01

inni

Sosialurin